## Lýsing eftir

# pedagogi til Vípuna

Sjálvsognarstovnurin Vípan søkir eftir 2 pedagogum 30 tímar og 1 pedagogi 32 tímar, at byrja 1. febuar 2008, ella eftir nærri avtalu.

Vípan er ein integreraður stovnur við børnum í aldrinum frá 2-8 ár. Ein stova í aldrinum 2-5 ár og ein stova í aldrinum 6-8 ár.

Arbeiðstíðinar eru skiftandi, frá 7.30-17.00.

**Vit bjóða eitt áhugavert starv:**

- hvar náttúran hevur stóran leiklut í gerandisdegnum og hvar spæl fyllir nógv
- hvar virðing og trivnaður hjá barninum er í hásætið
- við opinleika og ein jaligum hugburðið
- við broytingum hvar tú hevur tína ávirkan
- hvar vit eru byrjaði at arbeiða við "Den integrerende baggrund"

**Vit vænta av tær:**

- At tú ert útbúgvin pedagogur/hevur royndir og fagliga vitan
- At tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- At tú ert opin fyri broytingum
- At tú hevur góð samstarvsevnir yvir fyri børnum, foreldrum og starvsfelagum
- At tú sært fyrimunir fram um vansar

Um pedagogur ikki søkjur, verður hjálparfólk sett í starvið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Eyð Skúvadal, leiðara á tlf 317535/ 287535

Umsókn saman við avriti av prógvum og viðmælum, skal vera stovninum í hendi, seinasta lagi 28. desember 2007

**Vípan**

Vípuvegur 3 · 100 Tórshavn
Tlf. 317535 / 287535
bg-vipan@post.olivant.fo

# Aðalfundurin 2008

Aðalfundur felagsins verður á Hotel Føroyum leygardagin 29. mars 2008.

Skrá: smb. viðtøkum felagsins – sí viðtøkur á heimasíðu felagsins www.pedagogfelag.fo

## Formansval

Vísandi til § 10 í viðtøkum felagins, skulu uppskot til formansevni skrivliga latast nevndini í seinasta lagi 15.jan.2008.

Saman við uppskotinum skal sendast skrivlig váttan frá viðkomandi, sum er í uppskoti um, at hon/hann vil taka við vali.
Valdur formaður bindir seg til at taka við fulltíðarstarvi í felagnum.

## Val av nevndarlimum

Vísandi til § 8, skulu uppskot til valevni, saman við váttan frá tí uppstillaða, vera felagnum í hendi í seinasta lagi 1.febr.2008.
– Nevndin kann útseta freistina til 5.febr.

## Uppskot til aðalfundin

Vísandi til § 8 - Ynskir limur uppskot viðgjørt á aðalfundinum, skal uppskot latast nevndini við skrivligari váttan frá viðkomandi uppskotsstillara, og vera nevndini í hendi í seinasta lagi 1.febr.2008.

Skal sendast til: Føroya Pedagogfelag
Postsmoga 318
110 Tórshavn

**Føroya Pedagogfelag**

## LØGTINGSVALNEVNDIN

Leivur Harryson fm. – Malan Johansen – Bárður Larsen

# Valevnislistar til løgtingsvalið 19. januar 2008

Við hesum verður mint á, at valevnislistar til løgtingsvalið 19. januar 2008 skulu vera formanninum í løgtingsvalnevndini í hendi í seinasta lagi:

**leygardagin 29. desember 2007 kl. 18.00.**

Valevnislistin skal verða latin inn av einum stillara.

Gjøllari reglur um valevnislistar eru ásettar í §§ 17 – 18 í løgtingsvallógini (Ll. nr. 49 frá 20. juli 1978 "um val til løgtingið", sum seinast broytt við Ll. nr. 97 frá 1. november 2007).

**Í løgtingsvallógini er m.a. ásett:**

- at ein valevnislisti ikki má hava fleiri enn 43 valevni,
- at valevnini skulu vera so skilliga lýst við navni, starvi og bústaði, at ongin samanblanding við nakran annan valbæran persón kann standast av,
- at valevnislistin skal vera undirskrivaður av valevnunum og av í minsta lagi 10 og í mesta lagi 15 veljarum sum stillarum,
- at hjálagdur skal vera serligur listi yvir stillararnar, har teir eru skilliga lýstir við navni, starvi og bústaði,
- at ongin má stilla upp á meira enn einum valevnislista,
- at ongin kann vera stillari fyri meira enn ein valevnislista.

Á heimasíðuni hjá Innlendismálaráðnum www.imr.fo undir "Dømi um valevnislista" er at finna oyðublað til valevnislista og stillarar.

5. januar 2008 kl. 18.00 er síðsta freist hjá flokkum skrivliga at boða formanninum fyri løgtingsvalnevndini frá, hvønn ella hvørjar valevnislistar flokkurin góðkennir sum listar floksins.

**Vegna løgtingsvalnevndina**
Leivur Harryson
formaður

Smærugøta 22 · FO-100 Tórshavn
Telefon: 55 80 80 · Privat: 51 97 17
Fax: 35 51 01 · Teldupostadressa: leivur@lg.fo


# MC-Sølan hevur opið

**Mán. - fríggjadag frá kl. 10.00 - 17.30 Leygardag er stongt**

MC.sølan

Norðasta Horn · Tel. 311 101 & 216 300
Fax 313 763 · www.mc-solan.fo